gult10 cyan10 magenta10 svart10



# Hava kravt 20% í lønarhækking

**– Týsnáttina slitnaðu samráðingarnar ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Semingsmenninir fáa eina trupla uppgávu, sigur Ingeborg Vinther í Føroya Arbeiðarafelag**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*



*Týsnáttina slitnaðu samráðingarnar ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Ingeborg Vinther væntar, at tað verður sera trupult hjá semingsmonnunum at finna semju*

– Tað er heilt langt ímillum partarnar, so spurningurin er, hvussu tað fer at ganga. Tað mundi vera við blandaðum kenslum, at Ingeborg Vinther, helt 1. meidagshald á altjóða arbeiðarafelagnum í gjár.

Tá hevði hon sitið í fleiri tímar og togast við Føroya Arbeiðsgevarafelag um ein nýggjan sáttmála.

Men tað eydnaðist ongantíð at fáa glið á samráðingarnar og um tvey tíðina týsnáttina máttu partarnir viðurkenna, at har var onki at gera.

– Tað skerst ikki burtur, at sáttmálssamráðingarnar eru slitnaðar, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.

Tað endaði við, at arbeiðsgevararnir gjørdu at at senda boð eftir semingsmonnunum. Teir báðir semingsmenninir, John Rajani og Súni Schwartz Jacobsen, hava sostatt yvirtikið samráðingarnar.

Á miðdegi í gjár høvdu teir ikki kallað partarnir saman aftur til fundar, men Ingeborg vinther væntaði at hoyra frá teimum hvørja løtu.

### Trupul uppgáva

Men sjálv hon ivast ikki í, at semingsmenninir fáa eina trupla uppgávu.

– Vit standa so mikið langt frá hvørjum øðrum, at tað verður uttan iva trupult hjá semingsmonnunum at fáa eina semju snikkaða til, sum báðir partar kunnu góðtaka, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at Føroya Arbeiðarafelag hevur kravt eina lønarhækking upp á 20%.

Tað heldur hon er ikki órímiligt, tá ið hugsað verður um, at kanningar vísa, at keypiorkan er fallin 10% hesi bæði seinastu árini, so nógv er alt dýrkað.

– Samstundis hava vit gjørt púra greitt frá fyrsta degi, at fáa vit ikki eina fittliga lønarhækking hesuferð, verður ikki talan um at gera meiri enn ein eittárssáttmála.

Annars hevur talan verið um tvey ára sáttmálar nú heilt leingi.

Samstundis hevur Føroya Arbeiðarafelag eisini kravt, at verkafólk hereftir skulu lønast eftir starvsaldri.

– Tað er heilt órímiligt, at eitt fólk, sum hevur drúgvar royndir, t.d. á einum flakavirki, ikki skal fáa meiri í løn enn eitt fólk, sum kemur beint inn av gøtuni og ikki er inni í arbeiðnum.

Ingeborg Vinther sigur, at harafturat hevur felagið kravt at hon verður settur á ymisk mál í sáttmálanum, sum hava ligið á láni í mong ár.

– Arbeiðsgevarin hevur púra afturvíst okkara krøvum og tað eru fleiri av okkara krvøum, sum vit ikki so frægt sum hava viðgjørt nakað serligt. Tí vænti eg, at uppgávan hjá semingsmonnunum verður ómetaliga trupul hesuferð.

Men í øllum førum kann sigast, at Føroya Arbeiðarafelag hevur sett sær fyri at fáa munandi batar í sáttmálanum.

– Vit eru nú í 2001 og tað kann ikki blíva við, at tey lægstløntu, sum arbeiða í framleiðsluni, ferð eftir ferð skulu vera við sviðusoð afturímóti teimum alment løntu, sigur Ingeborg Vinther.

# Nevndin heldur fram



**Hon varð ikki liðug fyrsta mei, sum lógin segði, men fundur verður aftur fríggjadagin**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*

Nevndin, sum varð sett at áseta lønina hjá skiparanum og stýrimonnunum á nýggja vaktarskipinum, Brimli, er ikki liðug enn.

Annars skuldi hon verið liðug týsdagin eftir lógini, sum Løgtingið samtykti, men tað eydnaðist so ikki.

Tað var eftir at royndir í seks mánaðir at finna eina samráðingloysn vóru miseydnaðar, at Løgtingið samtykti at ein nevnd skuldi setast at áseta lønina hjá skiparanum og stýrimonnunum.

Í nevndini vóru fýra umboð, tvey fyri Fíggjarmálastýrið og tvey umboð fyri Skipara- og Navigatørfelagið.

Nevndin skuldi vera liðug 1. mai. Varð hon ikki tað, skuldi uppmaður veljast at skera ígjøgnum.

Í nevndini sita Trygvi Jacobsen, sjómansskúlalærari og lógfrøðingur og Páll Nielsen, lógfrøðingur, fyri fyri Skipara- og Navigatørfelagið og Tummas Magnussen, leiðari á lønardeildini í Fíggjarmálastýrinum, og Jógvan Ellefsen, lógfrøðingur, fyri Fíggjarmálastýrið .

Ellintur Abrahamsen sigur, at hóast nevndin ikki er liðug, veit hann onki um, at ætlanin er at velja uppmann.

Hann sigur, at nevndin skal hava fund aftur fríggjadagin og kanska verður uppmaðurin valdur tá.

# Fara at tosa við partarnar

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*

Semingsmenninir, John Rajani og Súni Schwarts Jacobsen fara nú at seta seg inn í, hva Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag, eru ósamd um.

Týsnáttina vóru teir kallaðir upp í samráðingarnar ímillum teir báðar partarnar, tí sjálvir mettu teir seg ikki, at teir komu longur.

John Rajani sigur, at tað fyrsta, teir hava gjørt, er at útseta eitt møguligt verkfall í eina viku.

– Síðani fara vit at halda fund við partarnar hvør sær. Tá ið vit soleiðis hava sett okkum inn í, hvat ósemjan snýr seg um, fara vit at fyrireika semingina. Tá verða partarnir kallaðir saman til fundar at vita, um ikki eitt úrslit kann spyrjast burturúr.

# Enn er óvist nær sandoyingar fáa Teistan

**Enn gongur ongan veg við samráðingunum um lønina hjá yvirmonnunum hjá teimum, sum skulu sigla við nýggju sandoyarferjuni**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*

Enn er púra óvist, nær sandoyingar fáa gleði av teirri nýggju sandoyarferjuni. Samráðingar hava nú í eina tíð verið ímillum Fíggjarmálastýrið og Skipara- og Navigatørfelagið og ímillum Fíggjarmálastýrið og Maskinmeistarafelagið um viðurskiftini hjá yvirmonnunum, sum skulu sigla við nýggja skipinum.

Men tær samráðingarnar ganga ikki væl. Tvørturímóti er enn onki komið burturúr samráðingunum við navigatørarnar, sigur Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum. Tískil er enn púra óvist, nær Sandoyarferjan verður sett í sigling.

Formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum, sigur, at tá ið saman um kemur, eru tað spurningurin um krónur og oyru, sum skilja partarnar.

–Tað er bara tíðin, sum fer at vísa, nær málið verður loyst.

Ellintur Abrahamsen sigur, at samráðingar vóru mánadagin, men at tað kom púra onki burturúr.

– Vit hava samráðst fyrr, men vrakaðu uppskotið, sum varð lagt fram. Á fundinum mánadagin varð uppskotið eitt sindur broytt á onkrum økjum, men á øðrum økjum varð tað blivið verri.

– Men høvuðsorsøkin til, at vit vrakaðu tað fyrra uppskotið, var ikki broytt í uppskotinum, sum varð lagt fram mánadagin og tí var ongin ivingur um at vit skuldu vraka uppskotið, sigur Ellintur Abrahamsen.

Annars hevur ljóðað, at semja hevur verið um, at Teistin skal setast í sama bólk sum Dúgvan. Men tað skilst á Ellinti Abrahamsen, at hetta er ikki heilt rætt.

– Við Dúgvuni er bara ein stýrimaður, men eftir manningarskjalinum fyri Teistan, skulu tveir stýrimenn vera við honum. Tí verður neyðugt at finna ein ella annan millumbólk til Teistan og at semjast um, hvussu sáttmálin skal snikkast til, so at pláss verður fyri tveimum stýrimonnum.

– Hetta er ein av høvuðsósemjunum ímillum Fíggjarmálastýrið og Skipara- og Navigatørfelagið.

Í løtuni er skiparin á Dúgvuni løntur í bólki átta og stýrimaðurin í bólki seks.

– Men nú tveir stýrimenn skulu vera við Teistanum, hava vit kravt, at skiparin verður løntur í bólki níggju, yvirstýrimaðurin í bólki átta og hion stýrimaðurin í bólki seks, sigur Ellintur Abrahamsen.

gult11 cyan11 magenta11 svart11



Franskur trolari við bryggju:

# Gamal men knáur

**Fransmenn eru fegnir um at hava eina lítla kvotu av svartkjafti í føroyskum sjógvi, og tí royna franskir trolarar her um leiðir nú í bestu svartkjaftatíð. Sosialurin var ein túr umborð á einum av hesum fronsku trolarunum**

FRANSKUR TROLARI
*Stefan í Skorini*



*Yves Duteil vónar, at reiðaríið fer at lata nýtt skip byggja fyri tann gamla trolaran innanfyri tey næstu trý árini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Teir hava verið í føroyskum sjógvi í nærum tríggjar vikur. Roynt verður eftir svartkjafti, sum síðani verður virkaður til surimi. Tað er sama framleiðsla, sum stóri trolarin hjá JFK Trol, Næraberg, fæst við.

Franski trolarin, Joseph Roty II, lá við bryggju í Havn í nakrar dagar, tá skipið skuldi bunkra brennievni og hava nakað av provianti umborð samstundis. Eisini hava teir havt trupulleikar við útgerðini, og hetta skal fáast í rættlag. Meðan teir eru inni, skal ein av manningini á sjúkrahúsi við onkrum smávegis snuddi.

Tá vit koma umborða, verður okkum fortalt, at skiparin fær sær ein blund, og vit vita, at ein sovandi sjómann skal mann ongantíð órógva.

Tað var tann 16. januar, at franski verksmiðjutrolarin legði frá landi í franska býnum Saint Malo í Bretagne í Norðurfrankaríki. Trolarin hoyrir heima í hugnaliga havnabýnum, har ein verksmiðja hjá reiðarínum eisini liggur. Har leggja teir surimi upp, sum verður virkað til ymiska framleiðslu.

Vanliga leggja teir leiðina til Føroyar tann 1. mai á hvørjum ári, men í ár hava teir verið eitt sindur fyrr á sjóvarfallinum. Hetta var fyri at fáa sum mest burturúr svartkjaftafiskiskapinum. Tað eru nú fýra ár síðani, at teir síðstu ferð vóru í havn í Føroyum.

### Gamalt skip

Tað skilst á øllum brøgdum, at hesin trolarin ikki júst er flaggskipið hjá franska reiðarínum Comapêche. Vit fáa ein faldara frá einum av teimum mongu yvirmonnunum, vit tosaðu við, sum lýsir virksemið hjá reiðarínum. Av teimum trimum trolarunum er eitt nýtt og stásiligt skip, meðan Josph Roty II er 28 ára gamal og illa tærdur. Reiðaríið hevur tríggjar trolarar, og eini 26 smærri bátar, ið royna eftir stórum rækjum útfyri eysturstrondini í Suðuramerika.

Tað sæst týðiliga, at hesin trolarin ikki er serliga nútímansgjørdur. Tólini á brúnni eru gamaldags og slitin. Onkur telda er tó at síggja millum tey gomlu tólini.

Meðan vit tosa við yvirmenninar nevna teir javnan Næraberg og samanbera við hann. Næraberg er tann stóra fyrimyndin, sum teir meta høgt, skilst á málinum.



*Bæði portgisar og fransmenn eru við umborð, og hýrurin tóktist at vera góður millum manningina*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

– Vit vóna allir, at um eini trý-fýra ár hava vit eitt nýtt skip, sum skal avloysa hetta gamla og útslitna skipið, sigur Yves Duteil, ið er 1. stýrimaður, men hann leggur afturat, at tað kanska ikki verður so skjótt kortini.

Yvirmenninir eru ikki heilt væl nøgdir við fiskiskapin undir Føroyum higartil. Slagið hevur verið ov smátt, sigur ein teirra.

Teir hava eini 600 tons umborð í løtuni, og trolarin tekur 800 tons. Kvotan hjá fronskum skipum í føroyskum sjógvi er 3000 tons tilsamans um árið, og har er umleið helmingurin eftir. Teir vóna sjálvsagt, at teir eru einsamallir í føroyskum sjógvi, men teir vita ikki rættiliga, um nakar annar franksur trolari er her um leiðir.

Eins og føroyskir fiskimenn gremur Yves seg um, at russarar eru heldur naskir, tá teir royna eftir svartkjafti undir Føroyum.

Joseph Roty II kann í mesta lagi framleiða 20 tons av surimi um dagin, men framleiðslan liggur sum oftast um tey fimtan tonsini. Næraberg kann í mesta lagi framleiða 50 tons av surimi um dagin. Umborð á franska trolaranum skulu teir hava 250 tons av vatni um dagin fyri at halda tørn í framleiðsluni.

Tá teir eru lidnir við sína kvotu undir Føroyum verður leiðin løgd til Mauritius. Hetta verður væntandi um 12. mai, sigur Yves.

### Góður hýrur

Sum vit ferðast runt í skipinum koma vit niður til kahýttirnar hjá manningini. Har er meira lív í monnum. Fleiri standa og práta uttanfyri og láturin rungar eftir í, tá ein hevur sagt hinum eina stuttliga søgu. Vit skilja ikki rættiliga, hvat teir siga, men fransmenninir skjóta eftir portugisarum, sum svara aftur, og teir flenna saman. Eisini er harður tónleikur at hoyra. Tónleikurin hjá Guns N´Roses ljómar í roykinum at skitnum klæðum og fiski.

Dagin eftir sum vit hava verið umborð, skal skipið aftur til fiskiskap. Hetta stendur skrivað við stórum stavum kring alt skipið. Á dúrkinum í fleiri støðum er skrivað við kriti, nær skipið fer avstað aftur. Soleiðis kunnu allir menn vita, nær teir skulu fara av Café Natúr og umborð aftur.

At skriva á dúrkið er ein vanligur háttur at geva boð til allar mans umborð.

59 mans eru við skipinum. Á Nærabergi eru eisini fleiri konufólk, men so er ikki her umborð. Umleið helmingurin eru fransmenn, meðan hin helmingurin er portugisar. Allir yvirmenninir eru úr Frankaríki, meðan portugisarnir eru lægri á stiganum. Ein russari rekst eisini umborð. Hann tekur sær av teimum sjey Baader maskinunum, sum eru í tí trongu verksmiðjuni.

Manningin býr ikki serliga væl. Tá er stórur munur á umstøðunum á Nærebergi. Kahúttirnar eru lítlar og trongar. Messan er heldur ikki innbjóðandi, tá vit verða vístir runt á skipinum. Á Joseph Roty II er ein fín messa fyri yvirmenninar og ein minni fín til manningina.

Tá føroyska tollvaldið kemur umborð verða vit noyddir at sleppa okkum avstað aftur, tí yvirmenninir hava úr at gera við at gera tollarunum til vildar.